# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Hetta er láturligt. Fyrst tekur Ny Alliance undir við okkara uppskoti, og síðani hótta tey við vali*

*(Pia Kjærsgaard)*

# Standmynd á Mars



*Myndina omanfyri hevur amerikanski fylgisveinurin Spirit tikið, og hon vísir ein part av oyðuni á gongustjørnuni Mars. Amerikanska rúmdarumsitingin NASA heldur kortini ikki, at talan bara er um eina sandoyðu, tí steinarnir fremst á myndini minna nógv um standmyndina av einum fólki. Tey, sum hava nærkannað myndina, vilja vera við, at „standmyndin" minnir sera nógv um Lítlu Havfrúnna í Keypmannahavn*

*(Mynd: NASA)*

# Obama fekk óhepnan stuðul

**Herfyri fekk Barrack Obama 41.000 dollarar í stuðuli til sítt valstríð. Nú hevur hann sent gevaranum pengarnar aftur**




*Antoin Rezko gav Barrack Obama 41.000 dollarar í stuðuli til valstríðið. Nú hevur hann fingið pengarnar aftur*

*(Mynd: AP)*

Barrack Obama roynir nú av øllum alvi at fáa veljararnar at gloyma navnið Antoin Rezko. Hann er handilsmaður í Chicago, men blaðið Chigago Tribune hevur avdúkað, at myndugleikarnir hava skuldsett hann fyri svik og korrupsjón.

Barrack Obama hevur váttað, at hann fekk 41.000 dollarar í stuðuli frá Antoin Rezko, men at hann visti einki um virksemið hjá manninum. Aftan á avdúkingina hevur hann tí sent honum pengarnar aftur.

Politiskir eygleiðarar siga, at avdúkingin kann koma Barrack Obama illa við, hóast eingin hevur lagt hann undir nakað ólógligt. Hinvegin hevur Obama alla tíðina umrøtt seg sjálvan sum ein við hægri etiskum støði enn hini valevnini, og tað kann koma honum aftur um brekku nú, siga eygleiðararnir.

# Fyrrverandi heryvirmenn vilja hava Musharaf frá

**Teir gomlu heryvirmenninir í Pakistan hava stóra ávirkan, og nú mæla teir forsetanum til at leggja frá sær**

Fyrrverandi heryvirmenninir vilja vera við, at Pervez Musharaf hevur skyldina av, at Pakistan er komið í eina eftir øllum at døma óloysiliga politiska kreppu, og tí mæla teir forsetanum til at leggja frá sær. Gomlu heryvirmenninir siga í áheitanini, at Musharaf umboðar ikki longur ta tjóðskaparligu eindina í pakistan og er tí ikki ímyndin av einum røttum forseta.

- Samanumtikið halda vit, at tað er hansara skylda at leggja frá sær, stendur at enda á skrivinum, sum meiri enn hundrað fyrrverandi generalar, admiralar og aðrir týðandi heryvirmenn hava skrivað undir.

Vanliga plagar felagið hjá pensjoneraðum heryvirmonnum bara at leggja seg út í spurningar um pensjónir og onnur viðurskifti, sum viðvíkja limunum, og áheitanin, sum felagið nú er komið við, verður roknað sum eitt álvarssamt bakkast hjá forsetanum, sum í hesum døgum er á ferð í Evropa.

Hasan-Askari Rizvi, ið arbeiðir á altjóða John Hopkins-skúlanum í Washington, sigur við tíðindastovurnar, at tað mest áhugaverda er, at áheitanin frá teimum gomlu heryvirmonnunum kemur beint upp undir valið í næsta mánað.

- Tað vísir, hvussu veikur Pervez Musharaf er, sigur Hasan-Askari Rizvi.

## STUTT SAGT

### Fundarforboð

Myndugleikarnir í Zimbabwe settu í gjár politisku andstøðuni forboð fyri at halda ein fund, sum andstøðan skuldi skipa fyri í høvuðsstaðnum Harare. Andstøðuleiðarin, Morgan Tsvangirai, sum skuldi halda røðu á fundinum, bleiv tikin, men varð latin leysir stutt eftir. Andstøðan mótmælti fundarforboðnum og vísti á, at myndugleikarnir høvdu upprunaliga játtað andstøðuni at halda fund í miðbýnum í Harare. Ætlanin er at hava bæði forseta- og tjóðartingsval í Zimbabwe í mars, og andstøðan vil vera við, at myndugleikarnir gera alt fyri at avmarka møguleikarnar hjá andstøðuni at fyrireika seg til valini.

### Tøkniverkfall

Umleið 700 teknikarar og mekanikarar hjá finska flogfelagnum Finnair vóru í gjár í samhugaverkfalli fyri at stuðla teimum, sum arbeiða á pappírsvirkinum Stora Enso, men sum hava fingið at vita, aqt tey missa arbeiðið. Stora Enso hevur gjørt av at lata trý pappírsvirkir aftur, og tað ger, at 985 fólk missa arbeiðið, skrivar FNB. Fleiri finsk fakfeløg hava mótmælt avgerðini hjá Stora Enso, og teir næstu dagarnar verða fleiri arbeiðspláss rakt av samhugaverkfalli.

### Burtur við biddarum

Í august verður Beijing vertur fyri teimum olympisku summarleikunum, og nú hava myndugleikarnir í býnum gjørt av at fáa allar biddarar og óskrásettar smásølur úr gøtunum, áðrenn leikirnir byrja. Í Beijing er eitt ótal av smásølum, sum royna at selja fólki ymsar smálutir, men hesi skulu ikki órógva gestirnar undir leikunum. Tað skulu biddararnir heldur ikki, sigur býráðið í Beijing.